# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Apolonia og Richard Johannesen gullbrúdleyp



Í dag, leygardagin 11. desember, eru tað 50 ár síðani, at Apolonia og Richard Johannesen í Hvannasundi giftust. Ikki minst millum teirra, sum plaga at vera í Zarepta, eru trivaligu, fryntligu og arbeiðssomu hjúnini væl kend. Í leguhúsinum í Vatnsoyrum hava tey verið nógv og hjálpt til, og tey eru framvegis millum teirra, sum taka tøk í Zarepta.

Apolonia, sum er fødd 25. apríl í 1929, er ættað av Biskupsstøð í Klaksvík. Tey flestu ella ivaleyst øll, sum eita Apolonia, hava ættarbond á Biskupsstøð. Nólsoyar Páll, sum var bóndi á Biskupsstøð, helt nógv av Napoleon Bonaparté, og hann ætlaði at kalla sonin hjá sær upp eftir framfýsna fransmanninum. Nólsoyar Páll og Marin Malena fingu eina dóttur eftir, at hann hevði fingið hetta hugskotið, og hon fekk navnið Apolonia. Tað sigst, at hann ætlaði at kalla hana Napolonia, men tað vildu myndugleikarnir ikki. Tá ið hann strikaði fremsta bókstavin, vildi danski myndugleikin boyggja seg, og síðani hevur navnið verið á Biskupsstøð. Tann fyrsta Apolonia á Biskupsstøð var tvey ára gomul, tá ið pápin gekk burtur í 1809.

Foreldrini hjá Apoloniu, sum í dag er gullbrúður, vóru Jenny og Jógvan Kastalag. Hon var av Biskupsstøð, og hann var av Eiði. Tey fingu seks børn, og tá ið mamman var sjúklig, lagaði tað seg soleiðis, at Apolonia vaks upp hjá Cathrinu og Hans Jensen á Varpinum. Hann var mammubeiggi Apoloniu.

Richard er ættaður úr Hvannasundi, og hann er føddur 2. oktober í 1928. Foreldrini vóru Hannedina og Poul Johannes Johannesen. Hann var ættaður av Norðtoftum og vaks upp í Britustovu í Hvannasundi, og hon var úr Svínoy.

Tá ið Apolonia og Richard giftust, fluttu tey inn í húsini, sum tey alla tíðina síðani hava búð í. Tey keyptu húsini, sum Mortan í Hvannasundi hevði átt. Mortan var pápabeiggi Richard, og húsini standa heilt niðri við sjógvin.

Í Klaksvík hevði Apolonia arbeitt í krambúðini hjá Kjølbro á Stongunum. Tá ið hon var komin norður í Sund, var hon heima og passaði mann og børn og sýndi blíðsskap fyri teimum, sum vitjaðu. Tá ið børnini vóru undankomin, arbeiddi Apolonia eitt skifti í Norðdepli í handlinum hjá Debesi Christiansen.

Richard hevur alla sína tíð verið skipsmaður og útróðrarmaður. Hann sigldi sum ungur við trolara, eitt nú við Skálabergi, har systkinabarnið Kaj hjá Mortani var skipari. Richard var blaðungur, tá ið hann fyrst gekk til motorpassara í Klaksvík og síðani á skiparaskúla í Havnini. Hann sigldi við svenskarum og var á sild við Lizzy, áðrenn hann fór at rógva út, og tað gjørdi hann í eini fjøruti ár. Eitt skifti dreiv hann Viðanes, sum hann átti saman við øðrum, og frá fyrst í seksti árunum og í 34 ár driftaði hann Brattanes, sum Heini Lassen, sáli, í Klaksvík, átti.

Sum útróðraformaður var eyðkennið hjá Richardi, at hann var í javnvág við seg sjálvan. Hann gjørdi ikki nógv burturúr, men hann visti, hvat hann ætlaði, og hann helt seg til tað, sum hann hevði ætlað, og hann hevur verið meinkunnugur við veður, streym og botn og harvið ein skilamaður, sum tað lá væl fyri at fáa fisk hjá, og tá ið hann altíð hevur verið røkin, arbeiðssamur og rættskaffin og bæði tók sær av maskinuni og stýrhúsinum, so hilnaðist tað væl.

Hóast tað nú eru nøkur ár síðani, at Richard gavst at dríva útróðrarbát, so hevur hann varðveitt sambandið við útróðurin. Hann hevur egnt nógv, og honum dámar so sera væl at flóta, og ofta er tað saman við teimum yngru í familjuni.

Apolonia og Richard eiga tríggjar døtrar. Katrin, Hannedina og Jenny. Tær báðar eldru búgva í Hvannasundi, og Jenny býr í Klaksvík. Barnabørnini eru tíggju, og tvey eru komin í triðja ættarliðnum. Tað er saman við børnunum og teirra, at stóri dagurin verður hildin.

---

## Ragnar C. Joensen 60 ár

Í gjár, fríggjadagin 10. desember, fylti Ragnar C. Joensen í Havn 60 ár. Ragnar hevur, síðani tað varð farið undir at gera sjónvarp í Føroyum, verið við í fremstu røð. Hann og Zacharias Hammer vóru við frá byrjanini av, og teir munnu vera teir einastu, sum vóru við í privata Sjónvarpsfelagnum, og sum framvegis hanga í.

Foreldrini hjá Ragnari vóru Lena og Conrad Joensen, sum búðu á Dalavegnum í Havn, og sum bæði høvdu røtur í Norðoyggjum. Lena var úr Klaksvík, og Conrad var føddur í Havnini, men búði fleiri av barna- og ungdómsárunum í Klaksvík. Lena og Conrad fingu fimm børn - Eyðun,



Árni, Ragnar, Marion og Sára.

Ragnar lærdi til radiomekanikara hjá beiggjanum, Eyðuni, sum fyrst í seksti árunum hevði sett seg niður í Runavík. Ragnar arbeiddi í fleiri ár á samskiftisdeildini hjá Telefonverki Føroya Løgtings. 15. juli í 1983 varð hann settur í starv hjá Sjónvarpi Føroya, sum tá var farið undir fyrireikingar at senda alment føroyskt sjónvarp. Teir fóru at senda í 1984.

Ragnar var í nógv ár tekniskur leiðari, og hann má avgjørt roknast sum ein av teimum, ið vóru við til at leggja lunnar undir Sjónvarp Føroya. Hesi seinastu árini hevur Ragnar verið leiðari á samvirkisdeildini, sum tekur sær av nógvum av uppgávunum og upptøkunum, sum regluliga eru á skránni.

Ragnar er giftur við Svanhild, fødd Christiansen, sum eisini er ættað úr Havnini, og sum eisini hevur røtur í Norðoyggjum. Mamma hennara, Annemalla, er úr Svínoy, og pápin, Leivur, er úr Norðdepli. Svanhild hevur eisini verið trúgv í sínum arbeiðsplássi. Í august í fjør hevði hon starvast innan skúlafyrisitingina í 40 ár!

Svanhild og Ragnar eiga fýra børn - Malan, Tórun, Leivur og Bárður. Malan býr í Tanzania, har hon og maðurin eru trúboðarar, og hini trý búgva í Havnini. Higartil eru abbabørnini hjá Ragnari fimm í tali.

Í frítíðini hava Ragnar og Svanhild ferðast nógv, og teimum dámar ógvuliga væl at fara til Svínoyar, har tey fyri einum tjúgu árum síðani bygdu fitt og snotulig hús norðuri á Gamla garði.

60 ára føðingardagurin verður hildin í dag, leygardagin.

---

**Dagurin**

**11. desember. Damasus**, deyður ár 384. Diakonur hjá pávanum Liberiusi og varð sjálvur valdur til páva eftir hann. Hann er fyrst og fremst kendur sum tann, ið álegði Hieronymusi at týða bíbliuna av nýggjum.

**12. desember. Epimachus,** deyður umleið ár 250. Kristin maður í Aleksandriu, sum varð tikin av døgum, tá ið Decius keisari ráddi.

**13. desember. Lucia**, deyð umleið ár 300. Ung genta úr Syracus í Sikiloy. Hon var trúlovað heidnum ungum manni, men narraði hann, varð klagað fyri kristnu trúgv sína og tikin av døgum. Siðurin við luciugongum við gentum við tendraður ljósi í hárinum er komin úr Svøríki.

Navnið Lucia kemur av latínska orðinum *lux*, sum merkir ljós.

---

**Gullbrúdleyp**

Leygardagin 11. desember hava Apolonia og Richard í Hvannasundi gullbrúdleyp.

Dagurin verður hildin saman við børnunum.

---

# Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum sýndu samkenslu, tá ið okkara elskaði pápi, verpápi og abbi

**Kalle Soll**

andaðist og varð borin til hvíldar

Takk til kirkjutænarar, sangarar, berarar og gravarar.
Takk til David Johannesen prest fyri tey vøkru orð.
Og takk tit mongu, sum fylgdu honum til hansara síðsta hvíldarstað á fold.
Takk fyri blómur, kransar, peningagávur og heilsanir.
Takk til øll tykkum, sum hjálptu til við ervinum.

Ein serstøk tøkk til starvsfólkið á B7 fyri dyggan stuðul og umsorgan. Og ein hjartans tøkk til allar trúfastar vinir, ið vitjaðu og stuðlaðu honum og okkum í hesi sváru tíð.

**Børnini v/familiu**

---

†

Sagt verður frá, at okkara elskaða kona, mamma, vermamma, omma og systir

**Randi Johansen**
**fødd Jørgensen**
**úr Havn**

andaðist á Ríkissjúkrahúsinum mánadagin 6. desember, 53 ára gomul.
Jarðarferðin verður úr Ebenezer 13. desember kl. 14.00.

Vegna familjuna,

**Olaf, Guðrun og Súsanna**